## Danbor til Grønlands

Danbor Service, sum er ein partur av A.P. Møller-samtakinum, hevur skrivað undir sáttmála við grønlendska reiðaríið Royal Arctic Line um samstarv í sambandi við ætlaðar royndarboringar eftir olju úti fyri vesturgrønlendsku strondini. Søren Fløe Knudsen, stjóri í Danbor Service, sigur, at felagið heldur seg hava fingið tann rætta samstarvsfelagan í Grønlandi. Danbor Service hevur sæti í Esbjerg og hevur júst fingið sær deild í Aberdeen.



## Nógv vilja til Íslands

Útlendingastovnurin, sum viðger umsóknir frá útlendskum ríkisborgarum um uppihaldsloyvi í Íslandi, hevur ongantíð fingið so nógvar umsóknir sum í fjør, skrivar Morgunblaðið. Umsóknirnar vóru 17.408 ímóti 16.651 í 2006. Av hesum vórðu 13.565 umsóknir játtaðar, og tað vóru yvirhøvur póllendingar, sum fingu játtandi svar. 9.182 av teimum, sum søktu um uppihaldsloyvi í fjør, vóru úr ES-londum. Av øðrum londum var Kina best umboðað.

# Misálit á føroyskar bankar

**Um uttanríkisráðharrin hjá heimastýrinum setur á stovn egið fíggjareftirlit, fer tað árliga at kosta føroyskum bankum umleið 80 milliónir krónur í øktum rentuútreiðslum, sigur Edmund Joensen**

FÍGGJAREFTIRLIT

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Edmund Joensen finnist harðliga at ætlanunum hjá landsstýrinum at yvirtaka fíggjareftirlitið*

Ein, sum longu hevur verið nógv frammi í sambandi við málið um at føroyingar sjálvir skulu hava fíggjarliga eftirlitið við bankunum, er Ednumd Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður.

Hann tekur undir við teimum – serliga bankafólki – sum eru meiri enn ivasom um eitt føroyskt fíggjareftirlit.

Landskassin er als ikki førur fyri at tryggja tær 20 milliardirnar av innlánum í føroyskum bankum, og vandi er fyri, at uppspararar flyra sínar pengar úr føroyskum bankum, sigur Edmund Joensen.

Hann vísir á, at landsstýrið einki heimaarbeiði hevur gjørt í hesum máli, og at tað er ein álvarslig støða í einum álvarsligum máli.

Hesa vikuna hava vit sæð, hvussu felagið Føroyskir Peningastovnar sakliga og staðiliga hava ávarað móti ætlanini, sum hóttir álitið á bankarnar, ið er tað virðismiklasta, bankavinnan eigur, sigur Edmund Joensen.

Víðari sigur løgtings- og fólkatingsmaðurin á, at grundgevingarnar hjá fíggjarmálaráðharranum, sum at »vit eru eitt stolt fólk« og »hvar var fíggjareftirlitið í kreppuni« hava lítið upp á seg. Hann rør eisini upp undir, at uttanríkismálaráðharrin biður tey tiga, sum ikki eru samd við honum, og hetta alt undirgravar trúvirði hjá bankunum.

Fyrrverandi løgtingsformaðurin heldur, at einfaldar útrokningar vísa, hvussu illa umhugsað ætlanin hjá landsstýrinum er.

Um heimastýrið skal hava egið fíggjareftirlit, so verður ein avleiðing, at føroysku bankarnir skulu gjalda hægri rentu, tá lánast skal uttanlands, sigur Edmund Joensen.

### Katastrofa

Teir almennu roknskapirnir hjá Føroya Banka og Eik Banka vísa, at teir hava lánt tilsamans uml. 8 milliardir krónur uttanlands. Vandi er fyri, at bankarnir skulu rinda eitt prosent eyka í rentu, um teir frameftir skulu vera undir eftirliti av einum nýggjum, óroyndum stovni hjá heimastýrinum. Tað gevur bankunum eina árliga eyka rokning á einar 80 milliónir krónur.

Hvør skal gjalda hesa rokning í seinasta enda? Neyvan nakar annar enn kundarnir hjá bankunum. Eg havi spurt meg fyri og fingið upplýst, at peningastovnarnir í Føroyum í dag gjalda tilsamans umleið eina hálva millión krónur fyri fíggjareftirlit í Danmark, sigur Edmund Joensen.

Ein annar spurningur er, hvør ska tryggja innlánini í føroysku bankunum, tá alt fíggjarøkið er yvirtikið.

Edmund Joensen vísir á, at í roknskapunum hjá bankunum síggja vit, at tilsamans 20 milliardir krónur í standa í innlánum í Føroya Banka og Eik Banka. Hesir pengar eru í dag tryggaðir í danska Indskydergarantifonden, ið allir bankar í Ríkinum rinda til. Í Føroyum er eingin kassi nóg sterkur at tryggja eina slíka upphædd. Hvørki landskassin og enn minni Landsbankin.

Er ongin trygd, er sannlíkt, at uppspararar taka sínar pengar úr føroyskum bankum og leita sær í tryggari havn. Tað merkir við øðrum orðum, at innlánini kunnu hvørva, og tað er einki minni enn ein katastrofa fyri ein og hvønn banka, sigur Edmund Joensen.

Hann heldur snøgt sagt ikki, at ætlanin hongur saman.

Heldur enn at leggja forðingar í vegin, gnaga burtur av kappingarførinum og pilka við trúvirðið hjá bankavinnuni eigur landsstýrið at geva vinnuni tær allar bestu umstøðurnar at virka undir, heldur Edmund Joensen.

Hann vísir á, at bankavinnan skapar nógv arbeiðspláss, vinnur nógvan pening uttanlands og fortelur samstundis umheiminum, at Føroyar er eitt framkomið samfelag, sum stendur seg í altjóðaøgjørda heiminum.

Øll – uttan landsstýrið – duga at síggja, at ætlanin hjá samgonguni um at yvirtaka fíggjarøkið og skipa egið fíggjareftirlit má sleppast, sigur ein ikki sørt bersøgin Edmund Joensen.

# Stór virðir upp í royk

**Skeið átti at verið kravt av øllum, sum fáast við sveising og annað »heitt arbeiði«, sigur Kaj Olsen, eina av eigarunum av Maskinverkstaðinum**

ELDSVANDI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein, sum hevur fingist við sveising og líknandi alt sítt lív, er Kaj Olsen. Han er ein av eigarunum av P/F Maskinverkstaðurin í Havn, men hevur seinastu tvey árini arbeitt hjá Wärtsila í Noregi.

- Alt ov ofta frættist um eldar à verkstøðum, og umborð á skipum, ið liggja við kei til umvælingar, og aðrar eldar sum hava við arbeiði av ymsum slag at gera, sigur Kaj Olsen.

- Felags fyri hesar eldar er ósketni, líkasæla og vantandi vitan um, hvussu farast skal fram, tá tílík arbeiðir skulu gerast. Hetta er ikki nakað eindømi fyri Føroyar, men munurin er tann, at í okkara grannalondum hava tey fyri árum síðani gjørt nakað vid hetta álvarsmál, sigur Kaj Olsen.

Parteigarin av Maskinverkstaðnum sipar til, at eftir at tey í 1992 í Svøríki byrjaðu við upplæring og sertifisering av fólki, sum fáast við arbeiði, har opin eldur verður brúktur, eru skaðaútgjaldingarnar hjá tryggingarfeløgunum minkaðar við 70-80 %.

- Í Noregi hevur man havt eina skipan við skeiðum í fleiri ár við góðum úrsliti. Tryggingarfeløgini eru við til at fíggja hesi skeið. Í Noregi kalla tey eitt tíðlíkt skeið fyri »kurs i varmt arbeide«. Skeiðið tekur bert ein hálvan dag og endar við eini roynd, sigur Kaj Olsen.

Skeiðið umfatar brandteori, hvussu ein tryggjar arbeiðsstaðið áðrenn byrjað verður til dømis at sveisa og annað líknandi arbeiði. Í Noregi er ikki loyvt at arbeiða við opnum eldi, uttan at hava tikið eitt tílíkt skeið.

- Tá ein fyritøka bjóðar seg fram at arbeiða innan oljuvinnuna, verður hugt eftir, hvussu fyritøkan røkir tey materiuellu virðini, og hvussu stendur til við persónsskaðum. Hetta er ofta avgerðandi fyri, um fyritøkan fær eitt arbeiði ella ikki. Eg vil við hesum orðum gera vart við hvussu álvarsligt hetta málið er, og samstundis heita á avvarðandi myndugleikar um, at fáa skipað viðurskifti á hesum øki so skjótt sum tilber, sigur Kaj Olsen.



*Tað átti at verið eitt krav, at fólk, ið fáast við sveising og annað heitt arbeiði, skuldu havt skeið og prógv at arbeiða við hesum*